# Ruth Hansen 70 ár



Í dag, 27. februar, fyllir Ruth Hansen, Klaksvík, 70 ár. Ruth er født í Danmark, men flutti sum smágenta við familjuni til Miðvágs. Hon giftist til Klaksvíkar, har hon í út við 40 ár arbeiddi á posthúsinum.

Ruth er født í Mørup í Jyllandi, har mamma hennara, Esther, var ættað. Pápin, Henning Ellefsen, var ættaður úr Miðvági, sonur Sámal og Hannu Ellefsen. Henning fór til Danmarkar at læra til bygningssnikkara og tá hann hevði frí, var hann og vitjaði beiggja Esther, Victor Madsen, sum hevði verið í Kanada saman við pápa hansara. Soleiðis komu Esther og Henning at kennast, og í 1945, tá kríggið var av, flutti tey til Føroya at búgva. Esther og Henning Ellefsen fingu tvey børn, Ruth í 1939 og John í 1944.

Í Miðvági búði familjan fyrst á Dalbø og síðani uppi á loftinum á Snikkaraverkstaðnum. Sum heilt ung arbeiddi hon í handli í Miðvági. Síðani fór hon í húspláss á Argjum, og sum 17 ára gomul fór hon til Danmarkar fyrst í húspláss og síðani á háskúla. 20 ára gomul flutti hon aftur til Føroyar og fekk arbeiði á posthúsinum í Havn.

Tá Ruth var 22 ár, fluttu foreldrini, Esther og Henning, til Grønlands at arbeiða. Henning doyði í Grønlandi í desember 1972 og varð grivin í Miðvági í februar 1973. Esther flutti til Keypmannahavnar, har hon búði, til hon andaðist í 2003.

Í 1964 giftist Ruth við Petur Hansen úr Garðinum í Klaksvík. Petur er sonur Hansinu og Esbern Hansen (í Garðinum). Hóast Ruth og Petur vóru uppvaksin í hvør sínum enda av landinum, kendust tey longu sum børn, tí ein arbeiðsgenta hjá Hansinu og Esbern var úr Miðvági, og hon plagdi at taka fitta smádreingin við sær í summarfrí. Ruth og Petur fluttu Í 1965 til Klaksvíkar, har Ruth skjótt fekk bjóða avloysarastarv á posthúsinum. Petur, sum fylti 75 fyrr í ár, var maskinsmiður. Tey fyrstu árini silgdi hann úti, seinni fekk hann sær verkstað, sum han rak, til hann mátti leggja frá sær vegna vánaliga heilsu. Ruth og Petur eiga trý børn, Hannu, Esbern og Rúna, og ommubørnini eru átta í tali. Dóttirin, Hanna, býr í Klaksvík, Esbern býr í Hoyvík og Rúni er búsitandi í Stokholm í Svøríki.

Ruth arbeiddi á Klaksvíkar Posthúsi, inntil hon fór frá vegna aldur fyri trimum árum síðani. Hon var nærløgd og góð við sítt arbeiðspláss og sínar starvsfelagar. Í dag eru tað uttan iva umsorganin fyri ommubørnunum, sum fyllir mest hjá Ruth. Men hon dugir eisini at seta tíð av til annað, tað verið seg tiltøk í samkomuni, Betesda, hugnakvøld saman við bindiklubbanum ella uttanlandsferðir saman við vinkonum.

**DH**

# Edith Mørkøre í Ribarhúsi






*Edith Mørkøre*

Í døgunum frá 5. til 25. mars hevur Edith Mørkøre listaframsýning í Ribarhús í Fuglafirði.

Við á framsýningini í Ribarhúsi verða hennara nýggjastu akrylmálningar. Framsýningina hevur hon valt at geva heitið “Árstíðir í lívinum” og íblásturin til málningarnar hevur hon út frá viðurskiftum, sum rørast í tí dagliga lívinum og hendingum sum hon ella onnur rundan um hana koma út fyri.

Edith Mørkøre er født í 1979, er ættað av Argjum, gift við Kristoffur Mørkøre úr Klaksvík og er búsitandi Inni á gøtu í Hoyvík. Edith hevur málað, síðan hon var tannáringur og hevur gingið á Háskúla í Rønde í Danmark, har hon tók sergrein í list. Hon hevur eina heimasíðu, har hon vísir sína list fram www.edithart.com, tó verða málningarnir til framsýningini í Ribarhús, ikki at síggja á heimasíðuni, fyrr enn eftir 25.mars.

Hósdagin 5. mars kl 17 verður fernerisering. Opið verður soleiðis: Hósdagin 5. mars kl 17-20, fríggjadagin 6. mars kl 13-18, leygardagin 7. mars kl 11-18, og sunnudagin 8. mars kl 14-20.

Síðani er framsýningin opin somu tíðir sum Piddasahandil fram til 25. mars.

Lesið Sosialin



Málarameistari SP/F
Niels Sørensen
TLF. 31 28 46 & 21 88 46
nielss@post.olivant.fo

**Vit sóknast eftir** verkum eftir Mykines, Reyni, Heinesen, Ruth Smith, Kamban, Glerfoss, Kampmann, Kruse, Waagstein og øðrum dygdargóðum listafólkum í samband við komandi søluframsýning.

**Fræittið nærri við at seta tykkum í samband við okkum.**

**Framsýningin verður 3.-7. mars, sí upplatingartíðir fyri Listagluggan.**

**Framsýningin endar leygardagin 7. mars kl. 14.00**



Jack Kampmann, Kvívík 1957, 65 x 95 cm



Ingálvur av Reyni, 1993 - Trolaradekk, 130 x 195 cm

ART Listagluggin GALLERIE

Niels Finsensgøta 25 · Tórshavn
Tlf. 322022 · Mob. 210022
listagluggin@hotmail.com
www.listagluggin.com

týsdag - fríggjadag:.......15.00 - 17.30
leygardag:......................11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !